HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Fulltrúi til Heilsumálaráðið

Lýst verður eftir fulltrúa til setan í Heilsumálaráðnum at byrja skjótast til ber.

**Starvið umfatar**
Sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar at ansa eftir og hava eftirlit við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og málsviðgerð í hesum sambandi, at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti, umframt at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Heilsumálaráðið sum heild.

**Førleikakrøv**
Tú hevur viðkomandi fíggjarliga, roknskaparliga ella samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni, ella aðra viðkomandi útbúgving.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar fíggjarligar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Harumframt vænta vit, at tú hevur góðan kunnleika til teldur, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum, hagtølum og málsviðgerð annars. At tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Avbjóðandi starv**
Starvið sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Nærri upplýsing**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid.arge@hmr.fo.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til: Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn.

**Freist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mars 2010, kl. 12:00.

Eirargarður 2 · 100 Tórshavn · tel 30 40 50 · fax 35 40 45 · hmr@hmr.fo · www.hmr.fo

# Søkt verður eftir Tekniskum stjóra

**Fótbóltssamband Føroya søkir eftir Tekniskum stjóra at byrja skjótast tilber.**

**Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. hesar:**
- Fakligur leiðari
- Høvuðsábyrgdina av venjaraútbúgvingini
- Høvuðsábyrgdina av leikaramenningini.
- Høvuðsábyrgdina av U-landsliðsvenjarunum.
- Seta møguliga talentmenning í gongd
- Leggja linjuna frá grassroots til elituna.
- Framleiða føroyskt fótbólts tilfar
- Samskipa fundarvirksemi
- Síggja nøkur ár fram í tíðina,
  – vinna dystin fleiri ár fram í tíðina

**FSF ynskir at tú hevur:**
- Í minsta lagi UEFA A- venjaralisens
- Drúgvar royndir sum venjari á høgum støði
- Drúgvar royndir sum venjarainstruktørur
- Fyrisitingarligar førleikar
- Kunnleika til enskt
- Kunnleika til KT

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er sjálvstøðugur, álítandi og ágrýtin, hevur góð samstarvsevni.

**Við bjóða**
Vit bjóða sera spennandi og sjálvstøðugt starv. Løn sambært avtalu.

Starvið hevur tilvísing til aðalskrivaran.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Virgar Hvidbro, á tel 220535, ella við teldubrævi: virgar@fsf.fo

Umsóknir skulu sendast til
**Fótbóltssamband Føroya**
**Postboks 3028**
**110 Tórshavn**

Umsóknarfreist
**22. mars 2010.**

www.fsf.fo

www.parykkar.fo
...hár alt lívið

Salong Fríðgerð





Nú ber til at fara inn á **www.parykkar.fo** og síggja ymiskar møguleikar, um tygum hava tunt ella einki hár.



Hárserfrøðingarnir **CLAUS** og **HENNING TOFTHILD** koma til Føroya og eru at hitta á salongini 7. mars.

Ring og fá tíð á 311545 ella 511545

Salong Fríðgerð · Niðaragøta 52 · 188 Hoyvík · Tel. 51 15 45

**Veitst tú eina góða?**

Ring til Sosialin tlf 341800





# Japanskir spíðshundar

Vit báðar eru 6 vikur gamlar. Onnur av okkum er til sølu. Sum fullvaksnar koma vit at viga ca. 6-8 kg. Hava góðkenda DKK ættartalvu, vac., chippmerkt, ormakur og djóralæknakanning.

Okkara foreldur eru fyrimyndarliga fitt og barnavinarlig.

Um tú hevur áhuga í einari av hesum bamsunum. skriva ella ring.

**sigrid.sivertsen@skulin.fo ella 510736.**

Lesið
**Sosialin**
-tað loysir seg